

*Ein næmingur í starvsvenjing hevur samrøðu við ein skúlanæming í Árnafirði – Leivur svarar fegin spurningum hennara*

# – Deiligt at ganga í skúla

**Leivur í Buð Justinussen er 8 ár og gongur í 2. flokki. Honum dámar væl at ganga í skúla.
- Vit skriva fyrisøgn, lesa og rokna, sigur hann. Eisini gera tey ymiskt ítriv, sum t.d. tøving, byggja gróthús og mangt annað**

SKÚLI
*Elin Neshamar, praktikantur*

Fimleikartímarnar hava dreingirnir í Árnafirði saman við 2. flokki í skúlanum við Ósánna í Klaksvík. Nú kennir Leivur eisini nógvar dreingir í Klaksvík, sum eru um sama aldur sum hann.

Tá ið vit møttu upp í skúlanum í Árnafirði, sparkaðu teir tríggir árnfirðingarnir fótbólt úti í túninum, meðan teir bíðaðu eftir Charlottu, læraranum, sum eisini undirvísir í Klaksvík.

Leivur greiðir frá at teimum dáma væl at sparka fótbólt, og eisini hava teir plakatir av kendum fótbóltsleikarum hangandi inni í skúlastovuni. Annars hugna teir sær við nógvum ymiskum til dagligt. Teir hava eina fína teldu standandi inni í skúlastovuni, og spæla teir ofta teldu í fríkorterunum.

Leivur gongur í 2. flokki, so hann hevur ikki danskt enn, so tá ið Jógvan og Poul lesa danskt, so lesur hann føroyskt.

– Men tá ið vit skriva fyrisøgn, skriva vit allir tað sama, sigur Leivur.

Annars er sera hugnaligt inni í skúlastovuni. Sum í øðrum skúlastovum hava teir ymiskt pynt, ið teir sjálvir hava gjørt. Teir hava nógvar plakatir, og góða útgerð, m.a. hava teir eisini sjónvarp, video og dvd.

– Tað er serliga tá ið onkur hevur føðingardag, at vit hyggja eftir filmi, greiðir Leivur frá, og leggur afturat, at teir eisini av og á hyggja eftir onkrum nýggjum filmi, sum júst er útkomin.

Leivur, Jógvan og Poul eru í skúla hvønn dag frá kl. 10:05 til 13:10, og fríggjadag eru teir í Klaksvík, og hava fimleik saman við 2. flokki í Skúlanum við Ósánna.

# Eru altíð saman

**Teir tríggir næmingarnir eru saman í skúlanum og somuleiðis eftir skúlatíð**

SKÚLI
*Rannvá Næs Guttesen og Lilja Holm Mortensen praktikantar*

**Árnafjørður:** Dansktbøkurnar Søren og Mette lógu opnar á borðinum, tá vit komu og órógvaðu tríggjar lítlar, fittar dreingir, ið vóru í tíma. Teir høvdu júst lisið føroyskt, og vóru nú í ferð við at lesa danskt.

Í flokkinum er ein drongur, ið gongur í 2. flokki, og tveir, ið ganga í 3. flokki, men tó eru teir allir í somu stovu.

Vit fingu okkum eitt prát við teir báðir Jógvan Símunarson Joensen og Poul Askham Olsen úr 3. flokki.

Teimum dáma sera væl at ganga í skúla, tí at teir bert eru tríggir næmingar og allir eru sera góðir vinmenn. Teir høvdu tó einki havt ímóti at verðið fleiri. Lærarin Charlotta er eisini sera fitt.

Teir eru í skúla frá klokkan 10.05 til klokkan 12.40, og matarsteðgur er klokkan 12.00.

Tað sum teimum dáma best at gera í skúlanum er at íðka fimleik, tí teimum dáma væl at sparka, og tað fáa teir høvi til at gera har. Ítróttartímarnir fara fram í Klaksvík, og eru skiftandi millum fimleik og svimjing. Tá teir hava ítrótt eru teir saman við 3. flokkunum í skúlanum við Ósánna.



*Teir báðir Poul og Jógvan ganga í 3. flokki og hava dansktbøkurnar liggjandi á borðinum*



*... og vælhildnan skúla hjá børnunum í ...kk*

## Tøving

Í fríkorterinum eru teir ofta úti í tí lítla skúlagarðinum og sparka bólt. Eisini dáma teimum væl at spæla telduspøl, og teimum dáma eisini væl at spæla ymisk spøl, sum Ludo og Kalaha. Til tíðir hyggja teir eisini í sjónvarp, men tað er ikki ofta, at teir fáa høvi til tað.

Í síðstuni hava teir saman við hinum dronginum og læraranum nálatøvt. Teir hava tøvt myndir av kvæðnum Øskudólgur og Sópingarkona. Hetta dámdi teimum sera væl.

Teir eru teir einastu dreingirnir í bygdini, ið eru á umleið sama aldur, og av tí grund eru teir oftani saman. Í frítíðini eru teir, tá veðrið er til vildar, onkuntíð úti og fiska. Teir spæla eisini nógv bólt, og allir droyma um at spæla við KÍ eftir summarferiuna.

Eftir samrøðuna, fór drongurin Leivur, ið gongur í 2. flokki, oman til handilin hjá Niklasi og keypti okkum kaffi og smákøkur.

Vit høvdu eitt sera áhugavert prát við lærarinnuna Charlottu Thorsteinsson, og vit kunnu siga, at dreingirnir hava eina ógvuliga fitta lærarinnu.

Eftir prátið og kaffimunnin við Charlottu var eitt sindur av restum eftir av køkunum, og tað bjóðaði Charlotta dreingjunum.

Hetta dámdi teimum væl og køkurnar smakkaðu óføra væl.



# Árnafjarðar skúli 1904

Fyrstu ferð, vit síggja nakað skrivligt um skúlabygging í Árnafirði, er í fundarbókini hjá sóknarstýrinum, har tað stendur:

"Aar 1903, den 4de Juli afmaalte undertegnede Medlemmer af Sognekommissionen et Grundstykke, hvorpaa agtes opført en skolebygning i Arnefjord 14 alen lang 10 alen bred udvendig maal. Joen Joensen og M. Mikkelsen".

10. juli 1903 sendir Clement Olsen, sýslumaður eitt skriv til løgtingið, har hann sigur, at tað leingi hevur verið øllum greitt, at Árnafjarðar bygd treingir til at fáa nýtt høli at halda skúla í.

Tær st ovur, ið higartil hava verið leigaðar frá fólki í bygdini, eru ikki hóskandi til tað skjótt vaksandi barnatalið. Einki høli er í bygdini, sum ikki verður brúkt til sovikamar, og rúmini eru eisini so smá, at ikki er nóg mikið av sitiplássi til tey 23 børnini í skúlaaldri, sum eru í bygdini; serliga ringt er at fáa pláss til skrivingina.

Forstandarskapið hevur tí viðtikið at senda umsókn til løgtingið frá Vágs sóknar kommunu um at fáa 1400 krónur í studningi til at byggja eina skúlastovu í Árnafirði fyri. Hon skal vera 12 alin long og 10 alin breið, bygd úr gróti og innan klødd við timbri.

Í 1904 verður skúlin tikin í nýtslu.

*Kelda: Árnafjarðar skúli 100 ár*